

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 09 - 2011

# Spildurnýtt frálandaskip á Havnina

Leygardagin 24. september kemur nýggja flaggskipið hjá Supply Service í Leirvík, útgerðarskipið Saeborg, á Havnina. Í hesum sambandi verður gjørt nógv burtur úr. Klokkan 14 verður skipsdópur á Vestaru Bryggju framman fyri Vónini, har gumman Johanna Rasmussen fer at geva skipinum navn. Aftaná verður opið skip, har møguleiki verður hjá fólki at síggja skipið og fáa onkran bita og okkurt leskandi afturvið. Leygarkvøldið verður stór móttøka í Norðurlandahúsinum við ikki færri enn 500 innbodnum gestum, av teimum koma 150 úr Noregi. Hetta er næsta útgerðarskipið hjá Supply Service. Fyrsta var Eldborg, sum er í drift, og í næsta ár kemur triðja skipið í frálandaflotanum hjá Sjóborgsamtakinum, Sjóborg, sum fer at teljast millum tey mest framkomnu av sínum slag í heiminum. Jens Meinhard Rasmussen, stjóri sigur við oljan.fo, at teir eru sera fegnir um nýggja skipið, sum longu hevur fingið sáttmála frá eitt nú tí føroyska oljufelagnum Faroe Petroleum. Tá triðja skipið kemur næsta ár telist frálandamanningin hjá Supply Service ikki færri enn 80 fólk. Tilsamans í samtakinum, sum eisini fevnir um fiskiskip, hotel og bilasølu eru meira enn 300 fólk. Millum gestirnar, sum eru komnir til Føroya at taka ímóti stásiliga farinum er stjórin í Havila, Per Sævik. Havila eigur helvtina av Supply Service og eigur annars eitt stórt tal av frálandaskipum umframt skipasmiðju. Lesið samrøðu við Per Sævik á oljan.fo seinni. Mynd - Per Sævik, stjóri í Havila her í Vágsbotni saman við sínum tekniska stjóra og Tummas Justinussen og Jens Meinhard Rasmussen frá Supplys Service. Mynd - oljan.fo/Jan Müller